# Funnu horvnan bý

**ELDORADO.** Amerikanski ævintýrarin, Gene Savoy, hevur funnið ein higartil horvnan bý, har sokallaða Chachapoya-fólkið búði. Hesi fólk vóru fíggindar hjá teimum helst meira kendu inkaunum. Býurin sigst vera ein av sjey sagnakendum býum, sum liggja í hesum umráðunum, spaniólar róptu Eldorado.

Tær stóru leivdirnar eftir býin eru funnar í regnskóginum norðarlaga í Peru, millum 500 og 600 kilometrar norðan fyri høvuðsstaðin Lima. Eingin hevur búð í býnum síðani 1400-talið, tá inkarnir vunnu endaliga sigurin á Chachapoya-fólkinum.

- Vit hava funnið ein horvið skógarimperium. Eg rokni við, at talan er um býin Cajamarquilla, sum er ein av teimum ótrúligu býunum, sum vórðu bygdir av Chachapoya-fólkinum, sigur Gene Savoy vid tíðindastøðina AP.

Býurin er stórur, samanlagt 65 ferkilometrar, og vegirnir eru steinsettir og lendið hevur verið dyrkað. Harafturat eru 36 smærri pyramidir í umráðnum.

Gene Savoy er 73 ára gamal, og hann hevur seinastu 40 árini funnið fleiri horvnar býir í skógunum í Peru. Í fjør fann hann ein annan av teimum sjey horvnu býnum.



# 340 milliónir til KT í fólkaskúlanum

**KT.** Danska stjórnin hevur gjørt eina semju saman við SF og CD, sum fer at geva danska fólkaskúlanum 340 milliónir krónur til kunningartøkni og miðlar.

Formaðurin fyri danska lærarafelagið heilsar átakinum vælkomnum

- Teldur eru eitt framúr reiðskap, og tað er tydningarmikið, at næmingarnir læra at brúka hendan møguleika. Men tey skulu eisini læra at skilja ímillum, so tað verður til útbúgving og ikki undirhald. Tí er tað umráðandi, at tað verða gjørd góð forrit, sum hóska danska fólkaskúlanum, sigur Anni Hertoft Andersen.

Semjan hevur við sær, at 340 milliónir krónur vera latnar til at menna undirvísingartilfar og gjøgnumføra eina eftirútbúgving av lærarum. Harafturat skulu allir danskir skúlar hava internetsamband.

# Trier og Olsen í sama báti

**TÓNLEIKUR.** Donsku Olsen-brøðurnir, sum vunnu altjóða Grand Prixið í ár, fáa nú eina hjálpandi hond frá einum øðrum kendum danskara. Talan er um ongan annan enn Lars von Trier, sum sambært einum enskum blaði skal gera nýggja sjónbandalagið hjá Olsen-brøðrunum.

Lars von Trier er saman við Olsen-brøðrunum heitasta navnið í donskum mentaralívi í løtuni. Nýggjasti filmur hansara, Dancer in the Dark, hevur júst vunnið Gyltu Pálmarnar á filmsstevnu í Fraklandi.

„Fly on the Wings of Love“, sum vinnarasangurin kallast, er eitt stórt hitt kring alt Europa í løtuni, og hetta hevur gjørt teir tilkomnu Olsen-brøðurnar til stjørnur uttanfyri danska kongaríkið.

Tad er ikki vinnarasangurin, sum Lars von Trier nú skal seta myndir til. Olsen-brøðurnir eru í holt við at fyrireika næstu stakútgávuna, og tað er í hesum sambandi, at von Trier er komin upp í leikin. von Trier hevur annars sagt, at hann nú ætlar sær at halda frí, men eftir øllum at døma fer hann tó at gera eitt sjónbandalag saman við donsku Grand Prix vinnarunum.

**Subject:** Teldubræv
**Date:** Fri 8 june 2000
**To:** post@sosialurin.fo
**From:** argr@tv2bornholm.dk
**Reply to:** argr@tv2bornholm.dk

TELDU-POSTURIN

# Summar og fótbóltur

Vaknaði nú eina náttina. Fór upp klokkan tvey; hugdi at tíðindunum hjá Sky News og zappaði so víðari. Fann eina spennandi sending, og var sitandi í slakar tveir tímar. Tørnaði inn aftur klokkan fýra; og fór upp til arbeiðis klokkan hálvgum sjey.

Hvørjum eg hugdi at hesa náttina? Tað skal eg venda aftur til seinni.

Áhugin fyri ítrótti kom tíðliga. Og áhugin hevur fevnt vítt um nógvar ítróttargreinar. Sjálvur havi eg ikki verið tann stóri ítróttarmaðurin, men eg havi roynt nógv spøl.

Fótbólt og hondbólt, róð, flogbólt og badminton og sanniliga eisini cricket; ikki at blanda saman við kroket, sum vit eisini spældu nógv, tá ið eg var smádrongur.

Allar hesar ítróttargreinar hava mín áhuga framvegis umframt aðrar. Men í dag eri eg noyddur at viðganga, at ein ítróttargrein stingur langt fra um allar hinar.

Fótbóltur.

Hví? Tí eg haldi áhiugin er lagdur í meg fra barnsbeini.

Gøtumenn spældu fótbólt á Oyruni tíðliga í tíðini. Summir av teimum gomlu, sum eg minnist fra tí eg var smádrongur, søgdust at hava verið góðir spælarar. Sum 8-10 ára gamal hevði eg ilt við at ímynda mær, at summir av teimum gomlu í bygdini høvdu verið kringir fótbóltsleikarar; ja, so góðir, at tað ferð eftir ferð eydnaðist teimum at vinna á klaksvíkingum og leirvíkingum.

Tá ið tíðini var fótbóltur leiktur aðra tíð á árinum. Tað var leikt tá ið menn vóru heima, so tað var ikki altíð líkindini vóru av teimum bestu.

Fyrsti organiseraði fótbóltur, eg minnist, var í Fuglafirði. Pápi mín sigldi út frá Fuglafirði og eg minnist væl, tá ið eg í fimtiárunum fyrstu ferð var á vøllinum í Fuglafirði. Ein stór uppliving.

Í altjóða fótbólti minnist eg dystirnar í Rom undir OL. Danska landsliðið kláraði seg stak væl. Vit lurtaði eftir danska útvarpinum, og sjálva finaluna minnist eg heilt væl. Danir misbrúktu eitt brotsspark og fingu silvurmerkir. Mamma og eg lurtaðu eftir Gunnar Nu, sum segði frá hesum ótrúliga spennandi dystinum.

Stuttligt at hugsa sær, at mong ár seinni arbeiddi eg í fleiri ár saman við manninum, sum brendi brotssparki. Flemming Nielsen; ein av bestu og mest elegantu leikarum, Danmark hevur átt.

B36-formaðurin og fyrrverandi stórspælarin, Alli Hansen, er giftur við gøtukonu. Hann kom av og á inn á gólvið, og hann tosaði eisini um fótbólt. Tað skapti eisini áhugan. Hann er eisini orsøkin til, at B36 altíð hevur staðið hjarta mínum nær, sjálvt um GÍ eigur innasta plássi.

Men tá ið eg var smádrongur vóru bert fýra stórlið í Føroym. HB, B36, KÍ og TB.

Seinni havi eg havt stór upplivilsi við fótbólti. Havi sæð óteljandi dystir, bæði á høgum og lágum støði. Væntaði at áhugin fór at minka, nú eg eldist eitt sindur, men tvørtur ímóti. Eg havi ongantíð verið so býttur í fótbólti sum júst nú.

Til alla lukku er sjónvarp uppfunnið. Tað hevur givið møguleikan at sæð fótbólt úr øllum heiminum. Fyrstu HM-dystirnar sá eg frá HM-kappingini í Onglandi í 1966. Tá var eg á skúlabarna ferð í Danmark og sá millum annað Norður-Korea loypa hvøkk á fleiri stórtjóðir, og sá eisini portugisisku heimsstjørnuna Eusebio vísa sítt kynstur.

Síðani tá havi eg sæð nógvar dystir. Nógvar, sum onki hava nyttað, men eisini nógvar spennandi og góðar dystir.

Sjálvandi tekur tað tíð at hyggja at dystum í sjónvarpinum, men tíbetur hevur konan hjá mær givið mær frið og av og á seinnu árini eisini hugt at dystum saman við mær.

Nú byrjar tað so aftur. Í kvøld verður EM kappingin í Hollandi/Belgiu sett, og tað hevur so við sær at hvør dagur nú verður tilrættalagdur efitr, nær dystirnir eru.

Ofta havi eg við mær sjálvum roynt at útgreina, hvat tað er, sum ger at eg kenni meg so bundnan at hesum spæli. Hvat er tað, sum fær meg til at standa tveir tímar ein sunnudag og hyggja at einum hálvvánaligum dysti.

Tað er ikki lætt at finna svar, men eitt av tí, sum er júst við fótbólti, er, at so at siga øll kunnu spæla hetta spæl. Sjálvt um tú ikki ert nakar úrmælingur, so kanst tú saktans vera ein av 11. Spælið sjálvt hevur í sær fleri element, sum eru spennandi. Tú hevur á høgum støði tann fína taktikkin, sum verður gjøgnumførdur við spennandi nærdystum, fínum og flottum longum sendingum tvørtur um vøllin, langskot og hørðu kappingina beint framman fyri málið, málmansspælið, sum er eitt sindur uttanfyri, men altíð er serliga spennandi at fylgja.

Eg veit væl, at teir klóku eisini leggja nógv annað í hetta spæl.

Sosial aspekt, sum vísa eina mynd av samfelagnum, ein serlig mannafólkaverð við serligum ritualum og so framvegis. Sjálvt av hesum er sjálvandi rætt, og hevur tú sitið í einum skiftirúmi við 15 monnum, so hevur tú hug at geva teimum klóku rætt. Tað er okkurt serligt.

Sjálvur gleði eg meg til í kvøld og til komandi dagarnar at síggja hópin av dystum. Hvørjum eg haldi við?

Nógvum liðum. Danmark stendur sjálvandi ovarlaga saman við Noreg og Svøríki. Ongland og Týskland, men eg eri noyddur at viðganga, at Holland helst er tað land, sum eg haldi við. Teir komu við totalfótbóltinum, teir høvdu Cruyff, van Basten, Gullit og Rijkard, og nú hava teir Kluivert, Overmars og ikki at gloyma Bergkamp.

So skuldi annað heimaliðið - og helst Holland - vunnið kappingina, so er tað OK. Áh, ja, eg skuldi venda aftur til, hvat tað var eg sá í sjónvarpinum hesa náttina millum tvey og fýra. Tað var EM-finalan 1988 millum Holland og Sovjet. Seinasti stórdysturin hjá Sovjet og minniliga málið hjá van Basten.

**Árni Gregersen**
**Bornholm**

post@sosialurin.fo





## FØÐINGAR

27. mai fingu Laila Joensen og Ró Sigurðsson, Klaksvík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4050 gr.

31. mai fingu Jóna og Poul Jespersen, Hvalba, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4460 gr.

1. juni fingu Britta Joensen og Hjørleif Olsen, Vestmanna, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3350 gr.

3. juni fingu Elsa og Hjørleif Hansen, Syðrugøta, eina dóttir. Hon var 51 cm. long og vigaði 3300 gr.

2. juni fingu Evida Jane Bruce og Janus í Dali, Hoyvík, ein son. Hann var 46 cm. langur og vigaði 2315 gr.

3. juni fingu Karis og Karl Martin Justesen, Strendur, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3650 gr.

6. juni fingu Elsebeth og Oleif Gerðisá, Nes, Eysturoy, eina dóttir. Hon var 54 cm. long og vigaði 4000 gr.

6. juni fingu Oluffa á Høvdanum og Jóannes Magni Mikkelsen, Syðrugøta, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3800 gr.

6. juni fingu Rannvá Troest og Kenneth Rasmussen, Runavík, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4150 gr.

6. juni fingu Tina og Bogi Rasmussen, Klaksvík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3750 gr.

7. juni fingu Maybritt Magnussen og Jan Hansen, Nólsoy, eina dóttir. Hon var 51 cm. long og vigaði 3650 gr.

8. juni fingu Jannie Mikkelsen og Dan Magnuson Olsen, Rituvík, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 2900 gr.



## ANDLÁT

1. juni
**Jona Højsted,** Svínáir, 91 ár

5. juni
**Bogi Christensen,** Esbjerg, 72 ár
**Signhild Valseth,** fødd Rasmussen, bús. í Norra, 74 ár

7. juni
**Jóhan Dávid Ljósá,** Davvi, Strendur, 80 ár

## KIRKJUR & SAMKOMUR

### Gudstænastur hvítusunnudag
*Havnar kirkja:* kl. 11, hátíðargudstænasta, Hans J. Joensen, biskupur
*Christianskirkjan:* kl. 11, (Talvan gongur fyri Heidningarmissiónina hjá Kirkjulig Missiónsfelagnum). Barnagudstænasta kl. 15, Hans Eiler Hammer
*Kunoy:* kl. 12, altarg., Niels Pauli Danielsen
*Eiði:* kl. 11, John Myllhamar. (Talvan gongur á Eiði fyri Bláa Kross)
*Selatrað:* kl. 11, Niels J. Nielsen, trúb.
*Hestur:* kl. 12, Kjartan Mørkøre
*Fríðrikskirkjan:* kl. 11, deknagudstænasta. (Talvan gongur fyri Ljóðførisgrunn kirkjunnar)
*Tvøroyri:* kl. 11,
*Hvalba:* kl. 12.30, Petur M. Ramussen
*Vesturkirkjan:* kl. 16, Heri Joensen. Vegna fagnaðargudstænastu í Havnar kirkju er ongin gudstænasta kl. 11.

*Gøtu kirkja:* Talvan gongur hvítusunnudag fyri kirkjuna.

### Gudstænastur 2. hvítusunnudag
*Havnar kirkja:* kl. 11, Erik Norman Svendsen biskupur og Bjarni Bæk
*Hvítanes:* kl. 11, Sverri Steinhólm
*Kaldbak:* kl. 12, Høgni Poulsen
*Christianskirkjan:* kl. 11, Karsten Nissen, biskupur í Viborg
*Sørvágur:* kl. 11, Niels Henrik Arendt, biskupur og David Johannesen
*Vestmanna:* kl. 11, Kjeld Holm, biskupur
*Kvívík:* kl. 12, Lise-Lotte Rebel, biskupur
*Hvalvík:* kl. 12, Morten Aagaard, fm. í Det Danske Bibelselskab
*Norðskála:* kl. 10.30 skriftamál, kl. 11 messa Bolli Gustafsson, biskupur, og Emil Olsen
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Bergur D. Joensen
*Kirkjubøur:* kl. 12, Øysten Larsen, biskupur og Heri Joensen
*Fríðrikskirkjan:* kl. 11, Tord Harlin, svenskur biskupur og Jónsvein Bech
*Fuglafjørður:* kl. 11, Holger Jepsen biskupur á Lolland-Falster Stift.
*Skáli:* kl. 11, Lars Schmidt, dómpróstur
*Oyndarfjørður:* kl. 12, Søren Lodberg Hvas, biskupur
*Tvøroyri:* kl. 11, Niels Holm, biskupur í Ribe
*Vágur:* kl. 11, Jan Lindhardt, biskupur í Roskilde
*Viðareiði:* kl. 11, Knut Andresen, dómpróstur
*Skúvoy:* kl. 11, Hans J. Joensen, biskupur, og Jákup R. Hansen
*Sandur:* kl. 12, Sofie Petersen, biskupur
*Árnafjørður:* kl. 11, altarg., Niels Pauli Danielsen

### Ebenezer
Sunnudagin kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. møti og kl. 21 útimøti. Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

### Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond
Morgunmøti kl. 11, kl. 12.15 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti.

### Filadelfia, Landavegur 22
Í dag heldur hvítusunnust. fram kl. 10.15 og kl. 14.15 seminar, kl. 20 vekingarmøti. 1. hvítusunnudag hvítusunnust. kl. 10.15 og kl. 14.15 seminar, kl. 18 vekingarmøti. 2. hvítusunnudag hvítusunnust. kl. 10.15 og kl. 14.15 seminar, kl. 18 vekingarmøti.

Týsdagin kl. 06 morgunbøn.

### Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Sunnukvøldið kl. 18: Møti við Reimundi Langgaard.

### Aglow, Tórshavn
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum mikukvøldið 14. juni kl. 20 við Elisabeth Syré úr Suðurafrika. Allar kvinnur eru vælkomnar.

### Frelsunarherurin, Tórshavn
Leygardagin kl. 11 útimøti.
2. hvítusunnudag kl. 11 møti, major Inger Sofie Tjåland talar, kl. 18 møti við Palla Petersen.

### Meinigheitshúsið í Havn
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Høgna Poulsen.
Týsdagin kl. 20 bíbliutími Jóh. ev. kap. 17.
Hósdagin kl. 20 ungdómsmøti, ung av Argjum skipa fyri.

### Meinigheitin í Hoyvík
Eingin sunnudagsskúli og einki møti á hvítusunnu.

### Zion, Kollafjørður
Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20. Dánjal Petersen úr Havn talar. Øll eru vælkomin.

### Saron, Vestmanna
Onki møti sunnudagin vegna hvítusunnumøti í Havn.

### Keldan, Skálafirði
Einki møti í Kelduni á hvítusunnu. Vit eru við í tiltakinum í ítróttarhøllini á Nabb. http://www.keldan.fo

### Ørkin, Saltangará
Møti verður sunnudagin kl. 19 í Arbeiðsmannafelagshúsinum Hæddini í Saltangará við Margeir Toftegaard.
Týsdagin kl. 20 húsmøti hjá Jonnu & Palla Højgaard, Saltangará.
Hósdagin kl. 20 bønarmøti.
Morgunbøn er mánamorgun, mikumorgun og fríggjamorgun frá kl. 6-7.

### Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum
1. hvítusunnudag kl. 19 møti við Juttu og Salli Lognberg.
2. hvítusunnudag møti við Kajberg Davidsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Missiónshúsið í Leirvík
Ungdómsmøti verður í Missiónshúsinum í Leirvík, leygardagin kl. 20 við Jógvan og Dagny Højgaard av Glyvrum.

### Missiónshúsið á Tvøroyri
Eingin sunnudagsskúli verður sunnudagin.
Vegna Hvítusunnumøti í Vági verður einki møti sunnukvøldið.

### Betel, Vágur
Leygardagin kl. 10 uppbygg. fundur í Betel, kl. 20 evangel. fundur í Betel, kl. 22 opið hús í Betel.
1. hvítusunnudag kl. 10 breyðbróting í høllini, kl. 16 uppbygg. fundur í høllini, kl. 16 barnafundur í høllini, kl. 19 evangel. fundur í høllini, kl. 22 opið hús í Betel.
2. hvítusunnudag kl. 10 uppbygg. fundur í høllini, kl. 15 uppbygg. fundur í høllini, kl. 22 opið hús í Betel.
Onsdagin kl. 20 bønarfundur í Betel.

### Missiónshúsið í Vági
Um hvítusunnu verða møti í missiónshúsinum við luttøku úr Havn og av Toftum. Eisini luttaka porkeningar o.o. við sangi. Leygarkvøldið kl. 20 møti.
1. hvítusunnudag kl. 18 møti. 2. hvítusunnudag kl. 18 møti.

### Samkoman Sion, Vági
Sunnudag: Morgunmøti kl. 11.00, kl. 11.30: Sunnudagsskúli. Evangeliskt møti kl. 18.00.
Telefonandaktin svarar á 373777.



## *Eitt ljós á gøtu míni*

***Johs. 14 16-17a:***
*Eg skal biðja faðirin, og hann skal geva tykkum annan talsmann, fyri at hann skal verða hjá tykkum allar ævir, sannleikans anda…*

Mangt í kristindóminum er torført hjá nútíðarmenniskjum at taka: Jesu føðing, Jesu uppruni, hansara mongu undurverk osfr. Men hetta sum hvítusunnuhøgtíðin ber boð um, ber av: Heilagur Andi yvir apostlunum, sum fær teir at boða hin krossfesta og upprisna Jesus Krist eins og Pætur á hvítusunnu og fær áhoyrarar at lurta og spyrja eftir frelsu, raktir av boðskapinum og síðani at lata seg doypa í navni Jesu Krists og Jesu Krists kirkja varð ein verunleiki.

Fyri nútíðarmenniskju er tað bara hitt materiella, sum telur: vánaligar ella góðar tíðir, fiskaloysi ella góð fiskiár, oljuríkidømi, skattir og avgjøld, høgir prísir og lønir, sum ikki røkka til. Og sjálvandi er tað nattúrligt, at teir materiellu lutirnir eru nógv frammi í huga okkara, tí vit hava øll okkara at svara til. Vit megu tí ikki gloyma at grundleggjandi fyri okkara tilveru, er ikki tað materiella. Men so fastgrógvin til tað materiella kunnu vit gerast, at vit einki skilja av allari talu um andalig virði, og hvat skal ein so gera við boðskapin um Heilagan Anda. Tað er ein heilt annar heimur.

Steðga nú eitt bil. Aftan fyri tað materialistisku uppfatanini av tilveruni liggur eisini ein andi – ein annar andi, sum stendur Gudi ímóti og bindir menniskju. Stríði stendur ímillum Guðs góða anda og ein illan anda og ikki millum Gud og menniskja. Gud elskar menniskja, men hin óndi fær menniskju at standa Gudi ímóti, og er hetta tann djúpasta neyðin í mannalívinum.

Gleðiboðini boða okkum frá, hvussu Gud við sínum anda vinnur sigur á tí illa og í menniskjum – tey tóku við orðinum vórðu doypt og tann dagin løgdust okkurt um trý túsund sálir til og upp ígjøgnum søguna og út um heimin hendi hetta sama aftur og aftur: Guds heilagi andi vann sigur á allari mótstøðu og menniskju komu til trúgv á Harran Jesus Krist við at orðið um hann varð boðað.

»Jørðin var oyðin og ber og myrkur var yvir frumhavinum og Guds andi lá á vøtnunum. Gud segði: Verði ljós! Og tað varð ljós (1. Mós. 1.2) Gud talaði, og so varð tað! hann beyð og so tað stóð (Sl. 33.9) Gud talar, Guds andi talar og so skapast lív. Hann blásti lívsanda í munn hans og soleiðis varð maður til livandi skepnu.

Vit hoyra seinri um ein annan anda, sum eisini talaði, men tað førdi til deyða fyri menniskju, sum lurtaðu eftir. Men gleðiboðskapurin ber boð um, at Gud slepti ikki sínum skapningi uppá fjall. Guds Andi var framvegis virksamur og talaði til menniskju, lívgevandi orð til frelsu: Fyrijáttannar orð í G.T. um messias frelsaran og í N.T. um orðið, sum varð hold og tók búgv okkara millum í Jesusi Kristi og hesin boðskapur og henda tala varð borin út og verður borin út til allar ættir og tjóðir. »Tann, sum oyru hevur, hann hoyri, hvat Andin sigur kirkjuliðinum«. Vit skulu tí ikki fara í holt við at greiða frá Guds heilaga Anda við tí fyri eygað at menniskja á tann hátt betri kunna fata Guds Anda; men vit skulu gera sum mælt verður til: Hoyra, hvat Andin sjálvur sigur kirkjuliðinum.

*Høgni Poulsen*

## Læknavaktir

**Tórshavn:**
*Læknavaktin* tlf. 310033.

**Eysturoy:**
*Leygardagin:*
Georg Egholm, tlf. 447010 til kl. 13
Knud Jacobsen, tlf. 423006 frá kl. 13
*1. og 2. hvítusunnudag:*
Georg Egholm, tlf. 447010

**Norðoyggjar:**
*Leygardagin:*
Jaspur Petersen, tlf. 456400
*1. og 2. hvítusunnudag:*
Jens Nylander Madsen, tlf. 287244

**Vágar:** tlf. 332413

**Suðuroy (norður):**
Tlf. 371560

**Suðuroy (suður):**
Tlf. 373030

**Tannlæknavakt,** Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13–14. Tlf. 314544.